Prát við Paddyrasta:

# Egypti í skotskum reggae-bólki

**"There is no such thing as bad weather, but only the wrong clothes!" Soleiðis orðaði Chris seg, ein av limunum í bólkinum Paddyrasta. Bólkurin lýsir seg sum ein fleirmentaðan keltiskan reggae-bólk. Ein av limunum í bólkinum er egypti.**

*johan@sosialurin.fo*

Aly Salam kendi einki til Føroyar áðrenn hann kom higar, men hann er ógvuliga bilsin av tí gestablídni hann hevur møtt her. Teir í bólkinum hava verið her síðan hósdagin.

Aly er uppvaksin í Egyptalandi í Kairo, men sum 24 ára gamal flutti hann til Skotlands saman við familju síni. Her hevur hann búð síðan. Nú er hann 43 ár arbeiðir sum fíggjarráðgevi í Skotlandi. Frá tí hann var 9 ára gamal hevur hann spælt á ymiskar trummur, serliga tabla-trummuna. Síðan hann er komin til Skotlands hevur hann lært seg at kenna siðbundna skotska tónleikin og hevur hann lagt eitt sindur av miðeysturlendskum í tónleikin, sum hann er komin í samband við. Hann sigur seg vera egypta. Hetta sigur hann við eini rættiliga týðuligari skotskari dialekt. Vit práta um stutt um vónleysu støðuna í Miðeystri, um Ísrael og Palestina. Men slíkt prát hevur líkasum ikki pláss á einum festivali, so vit práta meiri um tónleik og um hansara uppliving her í Norðuratlantshavinum.

Hann sigur seg kenna seg heima her í Føroyum.

- Ein skuldi vænta at fólk vóru eitt sindur meiri afturhildin, men opbinleiki og gestablídni er tað eg havi møtt. Hetta minnir meg nógv um, hvussu fólk, har eg komi frá, taka ímóti gestum.

Hetta er fyrstu ferð Aly spælir við bólkinum. Hann avloysir vanliga áslágaran, ið er nigeriani. - Bólkurin umboðar Sameindu Tjóðir, greiðir tann eini við borðið skemtandi frá. Tveir eru írar, ein nigeriani, ein onglendingur og so ein egypti. Vit blanda ymiskar tónleikatraditiónir saman og leita eftir sambondum, reggae-rytmur hóska væl til hetta projektið hjá okkum. Írin Brian Gilligan, sum hevur búð her í landinum, hevur stovnað bólkin.



Bonnie Tyler:

# Thank God for Boto



*Hóast Bonnie Tyler er 55 ár, heldur hon ikki tað er trupult at útsjóndina við líka: – Eg havi fingið Botox innsprænt í pannuna, kjálkarnar og høkuna, greiður hon frá uttan himpr*

**– Aldur eigur ikki at verða ein forðan fyri, at tú heldur fram við at framføra á palli. Og tað ber so avgjørt til at arbeiða við útsjóndini. Eg sigi bara: Takk Guð fyri botox, sigur Bonnie Tyler**

GIRL TALK
*Lív Højsted Horsdal & Heri á Rógvi*
*horsdal@sosialurin.fo*
*heri@sosialurin.fo*

Tríati ár í tónleikaheiminum krevja sítt. Og Bonnie Tyler fjalir ikki útyvir, hvørji amboð krevjast til at halda útsjóndina við líka – og unga:

– Hóast eg eri 55 ár, er tað eingin trupulleiki at halda útsjóndina við líka. Eg sigi bara: Takk Guð fyri Botox, sigur Bonnie við einum glasi við Diet Coke í hondini. Sjokulátakøkan í flogmatinum er koyrd burtur. Tí ætlanin er at lætna nøkur kilo:

– Eg havi fingið Botox innsprænt í pannuna, kjálkarnar og høkuna, greiður hon frá uttan himpr og kveistrar alt prát um vandan við evninum burtur.

Tað er ein ógvuliga friðsæl kvinna, sum tosar frítt frá livrini umborð á Atlantic Airways leygarkvøldið – sama dag, sum hon skuldi á pallin á MjúS. Bonnie er prátingarsom, fegin og professjonell beint áðrenn mjørkin, vindurin og lufthólini órógvaðu hugnan. Í hesi løtu var hon lukkuliga óvitandi um, at viðførið hjá henni stóð eftir í Keypmannahavn, og at omanlop var á Oyrargjógv.

### Sjokulátakøkan burturbeind

Flestu kvinnur miðskeiðis í 50'unum øvundað óivað útsjóndina hjá valisisku songkvinnuni.

Og sum kvinnur flest kundi Bonnie eisini hugsað sær at lætna nøkur kilo:

– Mær dámar ikki bara mat. Eg elski at eta. Men tað er vorðið ov nógv. Eg skal í øllum førum lætna fimm kilo, sigur Bonnie Tyler. Og hon er heldur ikki bangin fyri at vísa, hvar á kroppinum ummálið skal minka nakrar sentimetrar.

Tey flestu minnast óivað myndirnar av Bonnie Tyler frá 80'unum. Við stórum hári og tjúkkum svørtum eyelinara kring eygað – og nakað væl afturat. Hóast retrobylgjan hevur gjørt sína innrás, ætlar Bonnie sær ikki at finna klædnaskápið frá 80'unum framaftur:

– Eg ristist, tá eg síggi

